Fløgan skal fløva

# – Lekkurt at syngja teir gomlu sangirnar



**– Sangirnir hava allir sera rámandi orð. Teir eru so hjartanemandi, at ein skal næstan vera kaldur fyri ikki at verða gripin av teimum, sigur Eyðun Jacobsen.**
**Í hesum døgum er hann í ferð við upptøkurnar til eina fløgu, sum kemur út um ein mánað**

REPORTASJA
*Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Kris-Stuff Studio:** Tað ljóðar at ein kendur svenskur trummuspælari skal sita í upptøkuhølunum og spæla.

Úti í gongini hoyrist ikki eitt ljóð og heldur ikki, tá vit nærkast sjálvum kontrollrúminum. Her er einki sum bendir á at ein fløga er í gerð.

Men tá vit koma inn í sjálvt kontrollrúmið, fáa vit ein lítlan forsmakk – eitt veikt trummuljóð - av at hetta er staðið, har hesin sviin situr.

Jú, mín sann. Í upptøkuhølinum, umgyrdur av alskyns sløgum av trummum situr hesin lítillætni maðurin Claes Anderhell.

Soleiðis hevur hann sitið so mangar ferðir áður, bæði í heimlandinum, Noregi og Danmark. Men hetta er fyrstu ferð, at hann er í slíkum ørindum í Føroyum.

Orsøkin til at hann nú situr við trummurnar í frálíku upptøkuhølunum í Kris-Stuff Studio í Hoyvík er glyvramaðurin, Eyðun Jacobsen.

Hann hevur í longri tíð gingið við eini hugsan, um at geva út eina andaliga fløgu har denturin varð lagdur á dygd, bæði tá talan var um boðskap, løg og ikki minst tónleik.

Sangirnar hevur Eyðun funnið í Sangbókini, og har eru eisini løgini at finna. Til at knýta alt hetta saman er neyðugt við góðum tónleikarum.

Til hetta seinasta fekk hann fatur á Claes Anderhell, sum hesa vikuna hevur tikið upp trummuspælið til fløguna. Og tað er ikki at taka seg aftur í, at Eyðun er sera væl nøgdur við hesar fyrstu upptøkurnar.

– Eg havi næstan ikki orð fyri frálíka spælinum hjá Claes. Hann er simpelthen fantastiskur og er langt yvir tað eg væntaði.

– Eg siti bara við opnum polyppum og gapi eftir trummuspæli hansara. Hann er bara super, sigur ein sera fegin Eyðun, tá vit hittu hann í studio hósmorgunin.

### Frá hjarta til hjarta

Fyri Eyðun er eingin ivi um, at hetta verður eina sera góð fløg. Og ikki minst ein fløga, har hjartað hansara er við í hvørjum einasta sangi.

– Skal eg siga, akkurát sum tað er, so er tað bara so lekkurt at kunna syngja allar hesar gomlu, men kortini so góðu sangirnar.

–Teir koma beint úr hjartanum á mær, og eg ynski eisini, at teir skulu tala beinleiðis til hjartað á teimum, sum fara at lurta eftir fløguni, sigur Eyðun.

At teir koma beint úr hjartanum á Eyðuni hevur sína sjálvsøgdu orsøk: Sum barn var hann partur av Brøðrasamkomuni í Klaksvík, har sangur altíð hevur átt sín stóra leiklut.

Men tað var kortini ikki bert har at Eyðun var við í sangi.

– Eg kann eisini minnast, tá eg var barn at vit sungu nógv heima hjá okkum, tey longu og myrku vetrarkvøldini. Hesar løturnar fingu eisini týdning í mínum lívi.

– Eg síggi enn fyri mær, hvussu vit sótu har heimi í stovuni – foreldur míni og vit systkini – og sungu hesar góðu sangirnar úr Sangbókini, saman við guittara og harmoniku.

Tað er ein part av hesum kæra barnaminninum, sum Eyðun nú ynskir at geva víðari til føroyingar anno Domino 2006.



*Orðini og tónleikurin skulu hóska saman, sigur Eyðun Jacobsen, sum á hesi fløguni hevur lagt seg á eina fólk-popp tónleik. Besti sangurin á fløguni verður, eftir hansara tykki, tann kendi "Ein undurkelda man líða"*

## FAKTA

**Navn:** Eyðun Jacobsen, Glyvrar
**Starv:** Málarameistari
**Trúgv:** Verið trúgvandi síðani 12 ára aldur
**Útgávur:** Hevur verið við til ein hóp av útgávum, bæði fløgur og kasettir. Fyrsta útgávan var ein EP í 1973 saman við Jógvan Mortensen.
**Tænasta:** Lovsangsleiðari í samkomuni Kelduni í Skálabotni
**Ídag:** Byrjað upptøkur av fløgu við 12 sangum. Fløgan kemur út um einar tveir mánaðir.

### Varandi virði

Eyðun er í dag ein partur av samkomuni Kelduni í Skálafirði. Har er hann lovsangsleiðari.

Tá talan er um lovsang til Guds í dag verða ofta brúkt styttri kór og niðurløg, men Eyðun dylir ikki fyri, at fyri hann eru teir góðu og gomlu sangirnar gull verdir.

– Ja, hesir sangirnir eru ein skattur, sum eg ynski at grava fram aftur. Tekstirnir eru bæði djúpir og hjartanemandi, og heilt erliga, so havi eg altíð longst eftir at sleppa at syngja teir á fløgu.

– Saman við ótrúliga góðum løgum, eru hetta sangir, sum hava eitt varandi virði. Hetta eru faktiskt mínir favoritt-sangir, sigur Eyðun.